# Eivør vann íslendska virðisløn

**Eivør Pálsdóttir vann hóskvøldið eina íslendska leiklistavirðisløn fyri tónleikin, sum hon gjørdi til leikin Úlfhamssøgu**

VIRÐISLØN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hóskvøldið heiðraði íslendska leiklistin sínum bestu avrikum seinasta árið, og millum tey, sum vunnu eina heiðursløn, var føroyska songkvinnan Eivør Pálsdóttir.

Hon gjørdi tónleikin til leikin Úlfhamssøga, og fyri tað varð hon heiðra við virðislønini, sum verður latin til besta tónleik og ljóð.

Úlfhamssøga byggir á Úlfhamsrímur, ið eru gamlar íslendskar rímur, ið byggja á íslendsku saga'irnar.

**Tónleikur við røddini**

Tónleikurin hjá Eivør var fyri tað mesta instrumentalur, soleiðis at skilja at Eivør sang, men røddin var mest brúkt sum eitt ljóðføri fyri at uppbyggja ein stemning í leikinum.

Við góðari hjálp frá íslendska uttanríkismálaráðnum hevur tað eydnast Leikhúsinum at útvega fígging, soleiðis at leikurin eisini kann vísast í Føroyum.

Tað verður í Norðurlandahúsinum tann 1. september.

Leikstjóri á Úlfhamssøgum er Maria Ellingsen, ið er ættað úr Vági.




Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú ført allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

# Jógvan og fullir fiskar spæla

**Leygardagin verður árliga PopTop konsertin hildin í Grasagarði í Havn. Seks bólkar fara at spæla á konsertini, sum eisini er skipað sum ein kapping. Millum bólkarnar eru nýggj nøvn sum Drunken Fish og Jógvan**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seks bólkar fara at spæla til árligu PopTop konsertina, sum verður leygardagin.

Bólkarnir, sum fara at spæla eru Ineptus, Synarchi, Craisy Miss Daisy, Farrago, Drunken Fish og Jógvan.

Tað eru ungir og nýggir bólkar, sum plaga at taka lut í PopTop kappingini, og soleiðis er eisini hesaferð. Bólkurin Synarchi hevur verið eitt sindur frammi, men hinir bólkarnir eru rættiliga ókendir.

Men PopTop konsertin kann júst broyta hetta, tí hon hevur til endamáls at fáa nýggjar bólkar fram og geva teimum møguleikan at spæla alment.

Vinnarin av PopTop konsertin sleppur við til Ólavsøkukonsertina.

Tríggir dómarar við royndum innan tónleikalívið fara at finna vinnaran, og meðan teir tosa um tað, fara vinnararnir í fjør, Paradox, at spæla.

Tað er felagið Tónaungdómur í samstarvi við MBM og fyrireikararnar av Ólavsøkukonsertini, sum skipa fyri PopTop konsertini.

Konsertin verður leygardagin kl. 15.00

**Statoil Føroyar**
**søkir skrivstovunæming**

Til høvuðsskrivstovu okkara í Tórshavn, verður søkt eftir skrivstovunæmingi.

Umsøkjari við FHS ella HH prógvi hevur fyrimun. Vit vænta okkum ein næming, sum er fyrikomandi, er vanur at arbeiða við teldu, hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Vit bjóða eitt lærupláss við fjøltáttaðum uppgávum og góðum arbeiðsumhvørvi.

Í lærutíðini ført tú upplæring innan alt vanligt skrivstovuarbeiði og kemur eisini at hava nakað av sambandi við Statoilstøðir.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Sverra Kallsberg tlf. 34 35 00.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum og møguligum ummælum er 27. juni 2005.

Umsóknir verða at senda til:
P/F Statoil Føroyar
Postboks 3098
FO-110 Tórshavn
Att. Sverri Kallsberg

*Endamálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarum kring landið oljuúrdráttir og aðrar vørur. Fyri Statoil Føroyar arbeiða uml. 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og bestu tænastu. Umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.*

STATOIL
*- fyri viðskiftafólk okkara*